## Wozniacki lættliga víðari

Danska tennisstjørnan, Caroline Wozniacki, spældi seg í morgun lættliga víðari til triðja umfar av stóru kappingini Australian Open. Wozniacki, sum í løtuni liggur nummar fýra á heimsstyrkilistanum, vann í fyrsta umfari móti kanadisku Aleksandru Wozniak, sum hon annars onkuntíð hevur havt trupulleikar við. Úralitið var 6-4, 6-2. Í morgun møtti hon so týsku Juliu Görges, ið liggur nummar 78 á styrkislistanum, men er kend fyri eina sera góða servu. Í fyrsta dysti sínum við Australian Open sló hon 12 servu-ess. Men tað gjørdist ongantíð nakar ivi um, hvar sigurin fór. Caroline Wozniacki vann trygt 6-3, 6-1 og skal nú í triðja umfari møta ísraelsku Shahar Peer.




## Arsenal á odda

Við einum 4-2 sigri á Bolton spældi Arsenal seg í gjárkvøldið upp á oddasessin í ensku Premier League. Bolton var annars á odda 2-0, tá hálvur tími var spældur, men so fekk Arsenal ferð á. Rosicky, Cesc Fabregas, Tomas Vermaelen og Andrei Arshavin skutu eitt mál í part. Við sigrinum hevur Arsenal 48 stig fyri 22 dystir. Chelsea, sum hevur verri málmun, hevur somuleiðis 48 stig – men fyri 21 dystir.

## Eitt stórt vónbrot

– Fyri okkum er tað eitt stórt vónbrot, at vit ikki komu í steypafinaluna, tí vit vóru har í fjør og vildu sjálvandi fegin verið har aftur í ár. Vit royna at byggja eitt nýtt lið upp, og enn restar eitt sindur í, áðrenn ungu spælararnir ordiliga sláa til. Tí mugu vit bara arbeiða víðari við, staðfesti venjarin hjá Fleyr, Hans Mikkelsen, sum ikki var bangin fyri at rósa mótstøðuliðnum.

– Dráttur spældi optimalt og satsaði 100 prosent allan vegin ígjøgnum. Avrikið hjá teimum var taktiskt perfekt og har vóru heldur eingir feilir heldur, umframt at hevarin hjá teimum ger tað ótrúliga gott. Hóast vit vita, at tá vit leypa á, so vinna vit, tordu vit ikki nóg væl at gera tað í kvøld. Tá vit spæla optimalt, vinna vit á øllum liðunum, men enn hava vit ikki rutinuna til tað.

hil

## Hevði ikki sjálv trúð tí

– Eg eri stolt av, at vit eru komnar í finaluna, og fyri okkum er bara tað ríkiliga stórt. Og sjálv hevði eg ikki trúð tí, at vit skuldu koma so langt, segði Helga Nordendal í Drátti eftir hálvfinaluna ímóti Fleyr í gjárkvøldið.

– Maja Popovic spældi ein øgiligan dyst sum hevari, og uttan hana høvdu vit ikki klárað tað. Fleyr-kvinnurnar eru sanniliga góðar, og sjálv hevði eg stórar trupulleikar við góða blokkinum hjá teimum.

Helga ásannar, eins og hon gjørdi eftir sigur í Føroya Banka-kappingini um vikuskiftið, at finalan verður ein stórur gloypubiti, tí hon heldur kvinnurnar hjá SÍ vera í einum klassa fyri seg.

– Men nú eru vit har, og so fara vit sjálvandi at gera okkara besta, so tað verður ein góður dystur. Bara tað, at vit eru komnar í finaluna, er ein stórsigur fyri okkum.

hil




Ei undur í, at frøin var stór á spælarunum hjá Drátti, tá tað í gjárkvøldið við 3-0 sigri á Fleyr eydnaðist at spæla seg í steypafinaluna hjá kvinnum, sum verður ímóti grannunumí SÍ

Mynd: Álvur Haraldsen

### Fleyr-Dráttur 0-3 (22-25, 22-25, 24-26)

# Dráttur fór allan vegin

**Rutinan, saman við virðingini fyri mótstøðuni, var størsti munurin á liðunum í gjárkvøldið, tá Dráttur í hálvfinaluni sópaði Fleyr av vøllinum. Liðini vóru jøvn í løtum, men í avgerandi løtunum átti Dráttur avgerandi munin og vann fult uppiborið**

einslistir@kallnet.fo



Hilmar Jan Hansen

Dráttur vann seg í gjárkvøldið í steypafinaluna hjá kvinnum fyri fimtu ferð. Ikki kann sigast annað, enn at tað var gjørt við manér, tí hálvfinalan ímóti Fleyr, sum var spæld á Eiði, endaði við 3-0 sigri. Í hvørjum einstøkum setti var munurin hagtalsliga kanska ikki so stórur, men kortini var hann tað inni á vøllinum.

Hvussu nógv tað hevði at siga, at vinna henda dystin, sást ikki minst aftaná, tá spælararnir hjá Drátti lupu í ein stóran trunka, meðan teir hjá Fleyr við tárum í eygnakrókunum fóru yvir í ein krók í ítróttarhøllini fyri at vera fyri seg sjálvar, tá slagið var tapt.

Fleyr kom annars til Eiðis við einum vælmannaðum liði, ið eitt nú taldi fimm landsliðsspælarar. Birita Joensen og Anja Danielsen vóru frammanundan, Karina Debes var komin aftur og nú vóru so eisini Hjørdis Johannessen og Guðrið Syderbø við. Tá so var, kravdist sjálvandi ein ávís virðing frá mótstøðuliðnum, og ta virðingina hevði Dráttur!

Hinvegin skal heldur ikki forsmáast, at Dráttur á sínum liði hevði tríggjar fyrrverandi landsliðsspælarar í Helgu Nordendal, Herborg á Mýrini og Gerdu Nattestad, men tann spælarin, ið skaraði mest framúr og uttan síðustykki var »woman of the match«, var hevarin, Maja Popovic. Hon stýrdi spælinum til fulnar, og tá mest stóð á, evnaði hon at taka sakina í egnar hendur í tøkum tíma.

### Dráttur drúgvari

Fyrsta settið byrjaði eitt sindur nervøst og liðini skuldu líka vinna sær fótafesti og finna útav, hvat hitt ætlaði. Tey fylgdust hálvan veg, men so tók Dráttur seg framum og kom á odda 19-13. Fleyr, sum spældi helður meira nervøst, fekk tó minkað væl um munin, men tá Dráttur kom á odda 24-22 og hevði settbólt, setti Maja eina av sínum góðu fintum inn og avgjørdi settið.

Fleyr sá tó út til at taka annað skinn um bak í øðrum setti, tá liðið kom á odda við sjey stigum, 12-5 og 13-6, men so servaðu Herborg og Elspa Suffía Joensen vágaliðið innaftur í dystin, so bara eitt stig var á muni, áðrenn Maja tók yvir og servaði Fleyr frá 15-15 upp á 19-15. Fleyr vildi tó ikki sleppa takinum og kom framum so seint sum 22-21, áðrenn SÍ tók tríggjar teir síðstu bóltarnar og vann.

Aftur í triðja setti gjørdi Fleyr ein vørr og var á odda allan vegin uppeftir, onkuntíð við fýra stigum, til Dráttur fyrstu ferð kom framum, 16-15. Dráttur økti leiðsluna til 18-15, men so kom Fleyr afturíaftur og javnaði. Liðini fylgdust upp til 24-24, men so var tað fyrst Maja, sum fintaði eitt stig til 25-24, áðrenn Elspa Suffía við einum reinum servuessi avgjørdi fyrsta sett- og matsjbóltin og sendi Drátt í steypafinaluna.

Sostatt gjørdist Dráttur drúgvari í dystinum og vann uppiborið. Sum nevnt, var Maja Popovic spælarin, ið yvirstrálaði allar aðrar, men samstundis var talan um eitt gott liðavrik hjá Drátti, ið fylgdi uppleggjinum neyvt. Fleyr hevði ongantíð neyðuga dirvi til at halda fast, men sletti ov nógvar bleytar bóltar yvir um netið, og tá rutinan hinumegin er størri, kann tað bara ganga ein veg.

### Steypafinalur

**Kvinnur**

| | | |
|---|---|---|
| 2000 | Mjølnir-Dráttur | 2-0 |
| 2001 | Mjølnir-Dráttur | 2-1 |
| 2002 | TB-Mjølnir | 3-1 |
| 2003 | TB-ÍF | 3-1 |
| 2004 | TB-Dráttur | 3-1 |
| 2005 | Mjølnir-TB | 3-1 |
| 2006 | TB-ÍF | 3-1 |
| 2007 | Dráttur-KÍF | 3-2 |
| 2008 | ÍF-SÍ | 3-0 |
| 2009 | SÍ-Fleyr | 3-1 |
| 2010 | SÍ-Dráttur | |

**Menn**

| | | |
|---|---|---|
| 2000 | Mjølnir-Fleyr | 2-1 |
| 2001 | ÍF-Mjølnir | 3-0 |
| 2002 | SÍ-ÍF | 3-0 |
| 2003 | ÍF-SÍ | 3-2 |
| 2004 | ÍF-SÍ | 3-0 |
| 2005 | SÍ-Mjølnir | 3-0 |
| 2006 | Mjølnir-Fleyr | 3-0 |
| 2007 | Mjølnir-ÍF | 3-0 |
| 2008 | SÍ-Mjølnir | 3-0 |
| 2009 | ÍF-SÍ | 3-1 |
| 2010 | Mjølnir-SÍ | |

## FAKTA

Steypafinalurnar í flogbólti verða spældar í ítróttarhøllini á Hálsi í Havn leygardagin 20. februar.

**Kvinnufinalan: SÍ-Dráttur**
SÍ er í finaluni, tí liðið var oddalið, tá fyrsti triðingurin av kappingini í Eik-liguni hjá kvinnum var spældur.

Dráttur er í finaluni, tí liðið vann í hálvfinaluni á Fleyr. Liðini vunnu hvør sína av smærru steypakappingunum og máttu tí spæla hálvfinalu um plássið í steypafinaluni.

**Mansfinalan: Mjølnir-SÍ**
Mjølnir er í finaluni, tí liðið var oddalið, tá fyrsti helmingur av kappingini í Eik-liguni hjá monnum var spældur.

SÍ er í finaluni, tí liðið vann báðar tær smærru steypakappingarnar og kom sostatt í finaluna, uttan at hava fyri neyðini at spæla hálvfinalu.